# Nýggjárskonsert við nýggjum bólkum

**Bólkarnir á Nýggjárskonsertini í ár eru nýskapandi og spennandi, men samstundis stór nøvn í føroyskum tónleiki. Hetta vísir, at eitt nýtt ættarlið er komið til í føroyskum tónleiki**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

2. jólakvøld skipar Kyndil fyri árligu nýggjárskonsertini. Aftur í ár verður talan um nakað av tí besta innan føroyskan tónleik. Men í ár er samstundis talan um eina sera nýskapandi nýggjárskonsert. Hetta avspeglar tað, ið hendir á føroyska tónleikapallinum, har hópin av nýggjum bólkum hava trinið inn á pallin og hava vunnið sær nógvar fjepparar. Luttakandi bólkar eru Páll Finnur Páll, Lama sea, SIC, The Dreams og The Story Ends feat. The Message. Harumframt verður dansibólkurin The Black and White Crew við og fer at undirhalda millum orkestrini.



**Lama Sea**
Lama Sea er Føroya glaðasti bólkur. Men teir eru eisini ein fantastiskur bólkur. Lama Sea hava eingi miðal hampa løg. Øll løgini eru hamrandi góð. Løg sum "Fitti sangurin", "Everything I touch turns into gold", "He kicked my ass" og "Woody Allen" eru so ræðuliga fangandi og glað, at teir altíð eru ein fantastisk uppliving. Hetta vístu teir eisini, tá teir spældu seg í Prix Føroyar semifinaluna og gjørdust nummar tvey í Global Battle Of The Bands. Teir eru Føroya glaðasti bólkur, og tá teir spæla kókar tað frammanfyri pallin, tað kókar av ovfarakáti



**The Story Ends feat. The Message**
*Navnið The Story Ends er spakuliga vorðið eitt kent navn í føroyskum tónleiki. Hetta er ein bólkur, sum spælir undarligan nýmótans rokk, eitt lítið sindur í stíl við Queens of the Stone Age, tó uttan at herma. Teir hava spælt nógv í ár, m.a. á G! og í GBOB. Gttarleikarin er garrvillur og plagar at renna runt og líkjast einum nýggjum Angus Young úr AC/DC. Hetta er ein øðiliga spennandi bólkur, og teirra serligi rokkur fellur vanliga eisini væl í oyrini hjá áskoðarunum. Á Nýggjárskonsertini verður bólkurin onkursvegna flættaður saman við lýsingarátakinum The Message, ið er Føroya penasti bólkur.*



**Páll Finnur Páll**
Páll Finnur Páll eru langt síðan vorðnir fólkaogn, teir hava heilt serlig evni at skriva fangandi og syngivið-vinarlig popploeg. Lagið "Forelskaður Sjónleikari" av fyrru fløguni hjá bólkinum er tað størsta popp hittið í føroyskum tónleiki seinastu nógvu árini. Á nýggju fløguni hjá bólkinum, fær rokkurin ein eitt sindur størri leiklut. Hetta klæðir tónleikinum væl. Ofta eru tekstirnir væl hinumegin tað vanliga, og ikki alt er borðbart. Eitt nú skýrdi ummælarin hjá Sosialinum fyri nøkrum árum síðan lagið "Blottarar" fyri at vera eitt lag, ið ongantíð átti at verið skrivað. Fleiri tekstir hjá teimum eru so ófantaligir, at teir ikki kunnu verða spældir í føroysku loftmiðlunum. Tað gerst so serliga langt úti, tí hesar ófantaligheitir verða bornar fram í fittum popphami. Men Páll Finnur Páll eru altíð frálíkir á konsertum. Teir eru stutt sagt ein av bestu føroysku tónleikabólkunum í løtuni.



**The Dreams**
*The Dreams gjørdu rættiliga vart við seg, tá teir gjørdust nummar 3 av 3.000 tónleikabólkum úr øllum Evropa í sendingini A Cut, sum bleiv send á MTV Europe. Tey, sum valdu bólkarnar út, vóru kenda amerikanska songkvinnan Anastasia og ein A&R umboðsmaður hjá plátufelagnum Sony. The Dreams vóru so væl umtóktir, at teir í januar eru bodnir yvir aftur til London at spæla eina sýnisgluggakonsert fyri Sony og øðrum plátufeløgum. Bólkurin spælir popp-punk, og løgini eru sera melodiøs og fangandi. Teir eru eitt sera gjøgnumført konsept bæði tá tað snýr seg um tónleik og um útsjónd.*